HALDIÐ SOSIALIN




450,- um ársfjórðingin
- sparið 395,-
í mun til leysasølu

600,- kr. um ársfjórðingin í Danmark
(500,- kr. fyri 1 ferð um vikuna - 5 bløð)

Sosialurin
ÁRGJAVEGUR 26 · POSTSMOGA 76 · 110-TÓRSHAVN · TEL 341800
FAX 341801 · POST@SOSIALURIN.FO · WWW.SOSIALURIN.FO

Ókeypis
Verður sent ópostað
Sosialurin rindar postgjaldið

64

Sosialurin
Postsmoga 76
110 Tórshavn

Undirritaði teknar seg sum haldara av Sosialinum, og fær blaðið 5 ferðir um vikuna.

Navn:
Bústaður:
Postnr.:
Bygd/býur:
Telefon nr.:
Undirskrift:


# Danska Dong mennir sítt virksemi við Føroyar

**Dong kemur inn og ConocoPhillips fer út úr loyvum á føroyskum og bretskum øki**

OLJULEITING
*Jan Müller*

Danska oljufelagið Dong gerst alsamt meira virkið á føroyska landgrunninum og á bretskum øki vestan fyri Hetland. Tað er ikki so langt síðani, at DONG tók yvir partin hjá ConocoPhillips í 9 ára loyvinum 006 á føroyskum øki, har Statoil er fyristøðufelag. Nú hevur Dong so gjørt tað aftur. Felagið hevur yvirtikið partin hjá ConocoPhillips í 6-áraloyvinum á landgrunninum, har Staoil eisini er fyristøðufelag. Talan er um heili 30% í loyvinum, har ein brunnur skal borast aftrat frá 1. útbjóðingarrundu. Frammanundan er Dong eisini partur av 6-áraloyvinum 001, har Amerada Hess er fyristøðufelag og skal til at bora ein brunn aftrat.

Men tað er ikki bert í føroyskum øki á Atlantsmótinum at danska Dong økir um sítt virksemi. Eisini hinumegin markið hevur Dong gjørt avtalur um at yvirtaka partar av loyvum, og her er seljarin eisini ConocoPhillps, sum tykist meira og minni at taka seg heilt út úr oljuleiting á Atlantsmótin-um. Phillips var annars eitt av teimum mest virknu feløgunum, tá forkanningar vórðu gjørdar á føroyska landgrunninum í 90-unum.


*Leiti- og framleiðslustjórin í Dong, Søren Gath Hansen*

Talan er um trý loyvi á bretska landgrunninum vestan fyri Hetland. Mest áhugaverd er yvirtøkan av partinum hjá ConocoPhillips í Laggangassfeltinum. Her hevur Dong nú 20%. Aftrat hesum hevur Dong keypt seg inn í tveir aðrar gasslisensir, annar við 22,5% og hin við 5,66%. Sum partur av avtaluni millum tey bæði feløgini, hevur ConocoPhillips so keypt 10% av einum loyvi hjá Dong í norskum øki.

Mest áhugavert er keypið av partinum í Laggangassfeltinum, har vónirnar til eina stóra gassútbygging eru stórar, eftir at ein avmarkingarbrunnur er boraður og sær sera positivur út.

Við hesum keypum er Dong nú við í rættiliga nógvum loyvum báðumegin markið. Felagið er við í brunninum Cambo, sum júst er boraður, og sum tykist vera eitt lønandi fund. Tað er beint við føroyska markið. Og felagið er so eisini við í Bedlington-brunninum, eisini nær markið, sum verður boraður í august.

Tað er einki dulsmál, at Dong eftir hesi keyp av lisensum, er tað felagið, sum er við í flest loyvum á Atlantsmótinum.

Og tað fær leiti- og framleiðslustjóran í Dong, Søren Gath Hansen, at siga, at hetta stóra økið er eitt tað mest lovandi í Norðureuropa, tá talan er um at finna olju og gass. Hann sigur, at umframt Laggan-brunnin, sum júst er boraður, verður Dong helst við í trimum leiti- og avmarkingarbrunnum í hesum økinum í ár.

– Fundini fara at vera eitt sera gott íkast til okkara framtíðar gassframleiðslu men fara so eisini at tørva nýggjan viðgerðarútbúnað og rørleiðingar. Talan er sostatt um eina langtíðar íløgu. Framleiðsla frá hesum feltum byrjar um eini fimm til tíggju ár sigur Søren Gath Hansen.

At Dong verður meira virkið á Atlantsmótinum merkir so eisini, at stóra oljufeløgið ConocoPhilllips er við at taka seg úr hesum leitiøkinum. Tað ljóðar, at felagið heldur vil gera íløgur aðrastaðani, at hetta hóskar betur inn í arbeiðsprogrammini hjá felagnum. Við undirskrivingini av hesum pakkanum við Dong er ConocoPhillips í veruleikanum heilt úti av føroyska landgrunninum.




DONG
energy for more



# Ræðuliga stuttligt

**Alt ov fáir áhoyrarar upplivdu ólavsøkudag Amin Jensen spenna seg fult út**

UMMÆLI
*Heri á Rógvi*
*heri@sosialurin.fo*


*Alt kan vi spille: Amin Jensen megnaði sum fáur annar at undirhalda. Eitt framúrskarandi avrik*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Ein tungvektari innan undirhald.

Amin Jensen er í Danmark øgiliga stórur. Eitt stórt navn. Ein tungvektari innan undirhald. Men ein tungur drongur úr Danmark kundi ikki fylla allar stólarnar í høllini á Hálsi ólavsøkudag. Tað tóktist at vera fleiri tómir stólar enn fólk í salinum. Ikki tí. Upp-møtingin var bara góð allíkavæl. Eini 500-600 fólk vóru komin saman, og tað er rættiliga nógv í føroyskum høpi og eitt nú væl meira enn í stóra salin í Norðurlandahúsinum vanligar dagar. Men fyri ta góðsku, ið kom av pallinum, kundu nógv fleiri fólk verið himmals fegin um at verið møtt upp. Fyri 245 krónur hevur tú rætt til at krevja nakað afturfyri. Men tað fekst tú eisini í ríkiligan mát. Ein professionel og framúr framførsla hjá stóra manninum.

Ja, tað var stórt, enntá feitt og øgiliga, ræðuliga stuttligt.

## Klassikarar

Framførslan var eitt breitt útboð av tí nógva tilfarinum, Amin hevur staðið á palli við seinastu gott tíggju árini. Tað var mest av tí nýggjari slagnum frá »Stort« og »Hit med Amin«. Hevur ein verið til hesar framførslur áður, so var kanska ikki so nógv at heinta á Hálsi. Men tað eigur kortini at vera eitt risastórt upplivilsi bara at vera til staðar, tá hesin risin er á pallinum.

Hann legði út við nøkrum løttum og góðum skemtisøgum. Hann fekk flættað okkurt smávegis føroyskt upp í, men tað var ikki tað nógva um føroyinar og Føroyar á skránni. Ein av hansara størstu styrkjum er mátin, ið hann kroppin og at kalla allar sansir at undirhalda við. Síðani sang og undirhelt hann upp allar hugsandi hættir. Tónlistarligu evnini eru ikki at forsmáa.

Amin Jensen er á ongan hátt bangin fyri at gera gjøldur burturúr sær sjálvum. Tá hann valsaði runt á pallinum sum ímynd av einum dinosauri flánaðu øll í áhoyrarafjøldini.

Framførslan ólavsøkudag var í tveimum pørtum. Hin fyrri parturin var stuttligari. Tað svitast ikki. Ì aðru helvt legði hann seg meira eftir at herma eftir fólki. Tað eru nú einaferð fjúrtanhundrað kilometrar millum Føroyar og Danmark, og hetta gav fyri ein part at bíta. Fáir áhoyrarar kendust við eitt nú Jan Gintbjerg, men hermingin var heilt framúr kortini. Amin varnaðist eisini sjálvur, at føroysku áhoyrarnir ikki duttu av stólunum, tá ið kendir danskir persónar stóðu fyri skotum.

Onkrar søgur vóru av tí meira fúla slagnum, men tað var kortini ikki so tyngjandi nógvur toilethumor, sum mann oftani upplivir við modernaðum skemtarum.

Eina varna áhoyrarafjøld hevur hann týðuliga roynt at framført fyri áður. Hóast føroyingar kanska ikki eru vanir við at vera til tílíkar framførslur, har áhoyrarnir oftani liva væl við, so hugnaðu fólk sær óført og tordu eisini at svara til, tá stóri maðurin á pallinum vildi hava aftursvør. Tað var ivaleyst fyri báðar partar eitt upplivilsi í fremsta flokki.

## Alt kan vi spille

Sum eitthvørt annað gott show, so verður tað bygt upp til eina finalu. Vart tú í iva eftir fyrstu helvt, so var eingin ivi síðstu løtuna, at tú vart komin at síggja eina sýning í serflokki.

Við sær á pallinum hevði Amin Jensen ein klaverleikara, og teir bjóðaðu seg móti endanum av framførsluni til at syngja og spæla ein og hvønn sang.

– Alt kan vi spille, segði hann fer eftir ferð.

Og tað kundu teir eisini. Ikki bara spæla. Hesin og hasin sangarin vóru karikeraðir. Tað svitast ikki, at størri talent innan undirhald skal mann leita leingi eftir, og undirritaði hevur í øllum førum ikki sæð nakað betri av hesum slagnum í Føroyum áður.

Í farnu viku góvu vit ólasøkukabarettini karakterin 7 við einum píli uppeftir. Skulu vit kvitterað við einum karakteri her, so verður tað 11 við einum lítlum píli niðureftir. Tað var bæði sjálvstøðugt og avbera gott. Við meira tilfari viðvíkjandi Føroyum hevði avrikið verið framúr sjálvstøðugt og enn betri. Flott.

# Seta ferð á í Nólsoy

NÓLSOY
*Heri á Rógvi*
*heri@sosialurin.fo*

Nólsoyingar hava nógv í væntu. À nýggjárinum leggur kommunan saman við Tórshavnar kommunu, og undan hesum skal nógv gerast, og fleiri stórar verkætlanir bíða. Fyri stuttum varð nýggja grótkastið í Nólsoy tikið alment í nýtslu.

Jens Marius Poulsen, kommunustjóri í Tórshavnar kommunu sigur, at sáttmálin millum Tórshavnar og Nólsoyar kommunu um samanlegging sigur, at tá kommunurnar leggja saman, so skal vera gjørt klárt til fleiri størri verkætlanir. Millum annað ein barnagarður verður planeraður. Ein smærri fótbóltsvøllur skal gerast og onnur arbeiði. Síðani tekur tann nýggja samanlagda kommunan við eftir nýggjár og gera fleiri størri arbeiði liðug.

Ein nýtt grótkast afturat skal eisini gerast við havnalagið, men hetta nýggja verður stórt sum hitt.

Svimjihylurin hjá nólsoyingum stendur tó kortini ikki á skránni tey næstu fýra árini í øllum førum.


*Tað sær kanska út av nógvum nú, men um ikki so langa tíð verður barnagarður á hesum staðnum í Nólsoy*

*Mynd: Heri á Rógvi*